# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg eri ikki í iva um, at spælararnir høvdu verið sera fegnir, um vit sóu fleiri føroyskar áskoðarar til útidystirnar*

*Karl Vidtfeldt, FSF*



*Bíðitíðin á ferðini var long. Her sæst partur av hópinum bíða eftir boðunum um at fara umborð á flogfarið úr Frankfurt til Beograd*

**Tað tók sína tíð, áðrenn føroysku landsliðsspælararnir í gjár kundu tørna inn á Hyat Hotel í Beograd**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá ferðast skal við trimum rutuflogførum, so er nakað av bíðitíð eisini við í roknistykkinum.

Hetta var eisini galdandi hjá føroyska landsliðsferðalagnum á ferðini til serbiska høvuðsstaðin. Bæði í Kastrup og í Frankfurt mátti steðgast í nakrar tímar, og eftir at spælararnir fóru í fyrsta flogfarið beint eftir klokkan átta í gjáramorgunin, var klokkan farin av midnátt, áðrenn teir komu inn á kømurini á Hyat Hotel, har landsliðið heldur til.

Áður hevur tað ofta verið so, at FSF hevur leigað eitt flogfar, har tøku plássini eru seld áskoðarunum, men hetta er eftir øllum at døma ikki so stórur áhugi fyri longur.

- Eg vil ikki siga, at vit hava slept tí konseptinum. Seinasta dystin í seinastu undankappingini – á útivølli móti Italia – nýttu vit til dømis tað modellið, men tað er sjálvandi ein meting, sum vit gera í hvørjum einstøkum føri, sigur Karl Vidtfeldt, sum saman við Niclas Davidsen er FSF-umboð á ferðini.

Men var tað ein fyrimunur bæði figgjarliga og fyri liðið, um tað eydnaðist at fáa einar 30-40 12. menn við á ferðini?

- Tað er sjálvandi eisini nakað, sum spælir inn, tá vit gera okkara metingar. Og eg eri ikki í iva um, at spælararnir høvdu verið sera fegnir, um vit sóu fleiri føroyskar áskoðarar til útidystirnar. Men tað verða so onkrir kortini. Vit eru uppringdir av fólki, sum býr her ella sum onkursvegna hava umstøður at koma til dystin, og teimum royna vit sjálvandi at skaffa atgongumerki. Og hvør veit um tey ikki eisini hava Merkið við sær, soleiðis at hetta eisini er sjónligt á stadion, sigur Karl Vidtfeldt.

# Málið er at enda næstaftast

**Føroyska U21-landsliðið í fótbólti spælir leygar- og sunnudagin sínar seinastu undankappingardystir í hesum umfarinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við í ferðalagnum úr Vágum til Kastrup var eisini føroyska U21-landsliðið í fótbólti. Setningarnir hjá teimum eru á útivølli móti Aserbadjan og Grikkalandi, og talan verður uttan iva um truplar uppgávur.

Føroyar vunnu heimadystin móti Aserbadjan, og tí er avgjørda málið at halda fast um plássið sum næst aftast í okkara bólki. Eitt mál, sum tó krevur í minsta lagi eitt stig á ferðini.

- Vit fara eftir einum stigi í Aserbadajn, so fara vit eftir einum stig. Og kunnu vit fáa trý, so eru tey sjálvandi vælkomin, sigur Bill McCloud Jacobsen, sum saman við Heðini Askham er venjari hjá U21-liðnum.

- Men vit vilja avgjørt ikki leggja trýst á nakran. Vit skulu royna okkum í nógvum hita og í púrasta ókendum umstøðum, so tað verður á ongan hátt nøkur løtt uppgáva. Og hóast ein javnleikur er málið, so verður vónbrotið ikki so heilt ræðuliga stórt, um tað miseydnast. Men tað vildi verið framúr, um vit klára at røkka málinum, sigur Bill.

*Og tú óttast ikki umstøðurnar til dystin við nógvari ferðing, nógvum hita og øðrum?*

- Nei. Soleiðis eru treytirnar nú einaferð. Tá Aserbadjan vitjaði hjá okkum, høvdu teir eisini eina strævna ferð aftan fyri sge, so hetta eru nú einaferð treytirnar, sigur Bill McCloud Jacobsen.